## Al-Qaeda myrt gísla



Yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda hevur gjørt av við bretan Edwen Dyer, sum bleiv tikin og burturfluttur í afrikanska landinum Niger fyri meiri enn fýra mánaðum síðani. Felagsskapurin Site, sum heldur eyga við islamskum heimasíðum, sigur, at al-Qaeda hevur kunngjørt eina fráboðan, har tað stendur, at Edwen Dyer bleiv tikin av døgum tann 31. mai. Sagt verður, at maðurin bleiv rikin av døgum, tí bretska stjórnin sýtti fyri at gera eftir kravinum frá al-Qaeda um at lata tann muslimska prestin Abu Qatada sleppa úr fongsli. Bretar vilja vera við, at presturin er fremsti umboðsmaður hjá Osama bin Laden í Evropa.

# Chilenska alivinnan er tódnað munandi



*- Gongdin í føroysku alivinnuni er støðug, og nú amerikanski marknaðurin er altráður eftir laksi, samstundis sum vit tíbetur eru slopnir undan sjúkum, mugu vit siga, at føroyska alivinnan í allar mátar gongur spennandi tíðum á møti, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag*

**Meðan chilenska alivinnan var uppi á umleið 350.000-400.000 tonsum, tá hon var størst, er hon í dag niðanfyri 200.000 tons. Væntandi er, at chilenska framleiðslan av laksi fer niður um 50.000 tons, sum er á leið tað sama, sum føroyska framleiðslan verður í ár**

ALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Evropeiska alifelagið FEAP, sum helt aðalfund í Føroyum seinasta fríggjadag og leygardag, fevnir ikki bara um laksa-og sílaaling, men aling av fiski yvirhøvur.

Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag, sigur, at smáir bólkar vórðu skipaðir á fundinum, sum viðgjørdu viðkomandi mál, og soleiðis tóku føroysku alaraumboðini lut í arbeiði, sum í fyrsta lagi snúði seg um laksa-og sílaaling.

Aling snýr seg eisini um gansking, og soleiðis varð á aðalfundinum eisini kunnað um ymiskar granskingarverkætlanir, sum FEAP arbeiðir við.

Ragnar Joensen sigur, at nú chilenska alivinnan er í so tungum sjógvi, varð eisini nóg frammi um at fylla upp marknaðarplássið, sum er íkomið á amerikanska marknaðinum.

- Á fundinum skiltist, at chilenska alivinnan neyvan kemur uppaftur á fulla framleiðslu aftur fyrr enn í 2015, og so er spurningurin eisini, um landið yvirhøvur kemur uppá somu framleiðslunøgd, sum Chili hevði, tá framleiðslan var størst.

Ragnar sigur, at norðmenn, sum hava sett seg inn í chilensk viðurskifti innan aling, søgdu, at alivinnan í suðuramerkanska landinum í dag liggur niðanfyri 200.000 tons í árligari framleiðslunøgd.

- Vit fingu at vita, at chilenska alivinnan kann koma heilt niður á 50.000 tons, sum er á leið sama nøgd, sum roknast kann við, at føroyska alivinnan kemur at framleiða í ár.

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag vísir á, at øll chilenska alivinnan hevur ligið á einum øki, sum er umleið hálva aðru ferð so stórt sum Føroyar, og tá er skjótt at skilja, at fiskurin ikki hevur havt bestu umstøður.

- Chilenar hava drigist við fleiri sjúkur, og eitt nú hevur stór útbreiðsla verið av ILA.

Hann sigur, at longu áðrenn alarar í Chili av álvara fingu herviligu ILA-smittuna at dragast við, høvdu teir stórar trupulleikar við eitt nú lús.

- Tá so nógvur fiskur gongur á einum lutfalsliga lítlum øki, er skjótt, at hann gerst strongdur; hann gerst meira móttakiligur og stendur veikari yvirfyri ymiskum fiskasjúkum og eitt nú lúsatrupulleikum.

# Løgmaður sera positivur um føroyska ali

**- Søgan um føroyska fiskaaling hevur bert 30 ár á baki, og í dag verða neyv atlit tikin til umstøður og umhvørvi, soleiðis at fiskurin kann trívast so væl sum tilber, segði løgmaður, Kaj Leo Johannesen, tá hann setti aðalfundin hjá evropeiskum alarum**

ALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Útlit eru til, at føroyska alivinnan fer at standa fyri einum uppaftur størri parti av útflutningsvirðinum, enn hon ger í dag, segði løgmaður, Kaj Leo Johannesen, tá hann setti aðalfundin hjá FEAP*

Tað var løgmaður, Kaj Leo Johannesen, sum setti aðalfundin hjá evropeiskum alarum í felagnum FEAP, sum hildin varð í Føroyum seinasta fríggjadag og leygardag.

Aðalfundurin varð settur fríggjamorgunin, og í síni setanarrøðu vísti løgmaður á, at umstøðurnar hjá føroyskari fiskaaling nærum eru fullkomnar, at føroyska alivinnan er burðardygg, bæði lívfrøðiliga og fíggjarliga. Hann segði, at hóast føroyska alivinnan var fyri stórum fíggjarligum bakkøstum fyri fáum árum síðan, hevur vinnan megnað at reist seg aftur og stendur í dag fyri 22% av føroyska útflutninginum.

Løgmaður segði, at tað var við gleði og stoltleika yvir, at aðalfundurin hjá FEAP nú liggur í Føroyum, at hann nú fekk høvið at seta henda fund.

- Søgan um føroyska fiskaaling hevur bert 30 ár á baki, og í dag verða neyv atlit tikin til umstøður og umhvørvi, soleiðis at fiskurin kann trívast so væl sum tilber.

Løgmaður segði, at umstøðurnar til fiskaaling í Føroyum næstan eru fullkomnar, sum hann tók til, og tá segði hann seg serliga hava hitaviðurskiftini í sjónum kring um Føroyar í huga.

Hann tók eisini í aftur søguna, hvussu føroyska alivinnan byrjaði við nógvum alarum og um tað prísgrundarlag, sum tá var. Prísirnir í byrjanini fyri alda fiskin vóru nógv hægri, enn teir eru í dag, eins og vit í dag hava nógv færri feløg, sum standa aftanfyri alingina.

Løgmaður vísti á, at føroyska alivinnan í ár fer at framleiða umleið 50.000 tons, og at henda vinna soleiðis hevur stóran týdning – og er eitt stórt aktiv - fyri okkara samfelag, bæði tá ræður um útflutningsvirði og tey arbeiðspláss, sum henda vinna skapar kring um í landinum.

- Útlit eru til, at alivinnan fer at standa fyri einum uppaftur størri parti av útflutningsvirðinum, enn hon ger í dag.

Kaj Leo segði seg hava